

4 | Sosialurin Hugskot og viðmerkingar – send sms til 225000 Mánadagur 25. november 2013 · Nr. 136

Mánadagur 25. november 2013 · Nr. 136 Hugskot og viðmerkingar – send sms til 225000 Sosialurin | 5

SJÚKRAHÚS

Tummas í Garði:

SJÚKRAHÚSINI SKULU HAVA EINA LEIÐSLU

Fyrrverandi læknastjórin á Landssjúkrahúsinum fýlist á, at Heilsumálaráðið ikki hevur rygg til at gera neyðugu nýskipanirnar innan føroyska sjúkrahúsverkið. Sjúkrahúsini skulu hava felags leiðslu, og uppgávubýtið millum tey skal vera greitt, heldur hann

Tummas í Garði er aftur í sínum gamla starvi sum narkosuyvirlækni á Landssjúkrahúsinum eftir níggju ár sum læknastjóri – tað seinastu tíðina broyttist heitið tó til varastjóra. Nú leiðsluábyrgdin er tikin av herðunum, liggur betri fyri hjá honum at siga sína hjartans meining um bygnaðin og tað, sum gongur fyri seg í føroyska sjúkrahúsverkinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Ingolf S. Olsen

Viðbreknar, sterkar persónligheitir við stórum ego. Fólk av hesum slagnum eru eisini í sjúkrahúsverkinum, og er tað kanska ein av høvuðsorsøkunum til, at stríðið um og millum tey trý føroysku sjúkrahúsini ongan enda tykist fáa.

Í øllum førum heldur Tummas í Garði, fyrrverandi læknastjóri og varastjóri á Landssjúkrahúsinum, at Heilsumálaráðið og politiska skipanin ikki hava havt rygg til at framt neyðugar nýskipanir innan sjúkrahúsverkið, tí tað umframt politisku skipanina eisini ræðist ávísar persónar innan heilsuverkið sjálvt.

Øvugt valdsbýti

– Vit siggja ofta eitt øvugt valdsbýti innan sjúkrahúsleiðslu í Føroyum, og tað er serliga galdandi fyri tey smáu sjúkrahúsini. Tað er ikki stjórin, ið ræður, og so slettis ikki Heilsumálaráðið, men einstakir yvirlæknar, men fór aftur í sítt gamla starv sum narkosuyvirlækni. Í níggju ár var hann ávikavist læknastjóri og varastjóri á Landssjúkrahúsinum, og legði starvið ávís bond á hann, tá tað snýr seg um at luttaka í almenna kjakinum. Hesi bond eru burtur nú.

– Samstarvið í leiðsluni á Landssjúkrahúsinum hevur riggað fínt, og samstarvið millum sjúkrahúsini riggar eisini í mun til tær fortreytir, ið eru galdandi. Men tað er júst fortreytunum, tað er galið við, og onki verður gjørt fyri at broyta tær, sigur fyrrverandi læknastjórin.

Ein av hesum fortreytunum, sum sambært Tummas í Garði er skeiv, er, at vit vilja hava trý fult tilbúgvin sjúkrahús.

– Lógin krevur,at hvørt sjúkrahús skal hava ein medisinara og ein almenkirurg í yvirlæknastørvum. Hetta eru teir sonevndu generalistarnir, men trupulleikin er bara, at teir finnast ikki longur. Allir læknar í dag fara serlæknainn til endamálið, og so er hansara sergrein vorðin eitt viðgerðartilboð á sjúkrahúsinum. Sjálvsagt pyntar tað eisini um prestisjuna hjá sjúkrahúsinum, sjálvt um sergreinin er fullkomiliga tilvildarlig, staðfestir hann.

Ein leiðsla

Hann ivast onga løtu í, at tað er alneyðugt at øll trý sjúkrahúsini verða løgd saman undir eina leiðslu.

– Í pengum hevði størsta sparingin verði, um vit bara høvdu eitt sjúkrahús, men politiskt er tað avgjørt, at vit skulu hava trý. Eg eri heldur ikki úti eftir at steingja á Tvøroyri og í Klaksvík, men eitt nýtt og greitt uppgávubýti má gerast. Tað sum gongur fyri seg nú við ongari samskipan av virkseminum og høpisleysum dupultfunksjónum, kann ikki halda áfram, sigur Tummas í Garði og nevnir fleiri dømi:

– Ein føroyskur urologur, sum starvast á Aalborg Sjúkrahúsi, hevur í fleiri ár verið knýttur at Klaksvíkar mær eisini ein sergrein har. Eg haldi, at einhvør dugir at siggja, at her verður orkan ikki brúkt rætt.

– Tað sama við ortopediini, sum er í øllum støðum, og hjartasjúkuviðgerð, sum er bæði í Havn og í Suðuroy. Eitt er, at tað er demotiverandi at siggja, at dýr útgerð óneyðugt verður keypt til trý sjúkrahús í staðin fyri bara til eitt, men størri týdning hevur tað, at tú mást staðfesta, at dygd og sjúklingatrygd als ikki er í hásæti, tá man ber seg at upp á handa mátan, sigur Tummas í Garði.

Venjing skal til

At serskurðviðgerðir í einum frammanundan fólkafátækum landi sum Føroyum verða býttar út á trý sjúkrahús hevur eisini beinleiðis ávirkan á sjúklingatrygdina, heldur hann, tí tað merkir, at longri verður millum skurðviðgerðirnar, sum hvør einstakur lækni ger. Tað merkir, at venjingin, rutinan, verður verri.

– Rutinan hevur nógv at á onkrum lítlum sjúkrahúsi í Norðurnoregi heldur enn á einari stórari skurðdeild á einum stór-sjúkrahúsi við einum fólkagrundarlagi á fleiri hundrað túsund, sigur Tummas í Garði.

Skurðviðgerðir miðsavnast

Ikki minst tí heldur hann, at øll viðgerð, serliga skurðviðgerð, ið krevur serligar førleikar, skal gerast í Havn.

– Eg kenni øll hesi argumentini um at býta sergreinarnar millum sjúkrahúsini, men tað er í roynd og veru nakað tvætl, og harafturat vandamikið fyri sjúklingarnar, tí tá kompliseraðar skurðviðgerðir skulu gerast, er altíð brúk fyri meiri enn einari sergrein, og í øllum førum skulu tær vera tøkar, um okkurt miseydnast, ella komplikasjónir verða. Tí skulu allar sergreinarnar verða savnaðar á Landssjúkrahúsinum. Men tó kundu lækna- og sjúkrarøktarfrøðingatoymi verði send út til tey smærru

húsinum. Samstundis er eitt narkosulæknastarv normerað í Suðuroy og eitt í Klaksvík. Ongin vil tó í tey størvini, so har mugu tey leiga narkosulæknar inn, tá skurðviðgerðir eru á skránni.

á Landssjúkrahúsið er stórt, samstundis sum serlæknar eru bæði á Tvøroyri og í Klaksvík, sum ofta hava lítið at gera, sigur hann.

Ongin grundgeving

noyðast at fyrihalda okkum til tær ásetingar, sum danska Sunnhedsstyrelsen kemur við, og í Danmark hava tey, gaman í við buldur og brak, stongt fleiri smærri akuttar móttøkur, og miðsavnað til

skjóta diagnostisering og viðgerð, tvørturímóti kann hann lættliga seinka røttu viðgerðini og tískil gera ilt verri. Nógv tann besti førleikin í Føroyum er á Landssjúkrahúsinum, men

við barn, men at eiga kann kortini knappliga broytast til eina sera álvarsama støðu, sum krevur skjótt og trygt inntriv frá serlæknum. Tá er ikki nóg mikið, at bara ein almenkirurgur ella ein

dýra orku upp á akuttmóttøkur á teimum smáu sjúkrahúsunum.

Hann vil ikki koma inn á ítøkilig dømi, men sigur, at tað er hent meira enn eina-

ferð, at sjúklingar í Føroyum eru deyðir, tí teir ikki beinanvegin eru komnir undir røttu serlæknahendur undir bráðsjúku ella eftir vanlukkutilburð.

Tí heldur hann eisini, at tað var ein fullkomuliga ábyrgdarleys avgerð av landsstýrismanninum í heilsumálum at taka, tá hesin gjørdi av ikki at fylgja tilmælinum frá landslæknanum um at steingja føðideildina á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Tummas í Garði heldur tað vera skilagott at umskipa sjúkrahúsini í Suðuroy og Klaksvík til heilsudeplar, har dentur verður lagdur á endurvenjing, eftirviðgerð og heilsurøkt, og einfaldar skurðviðgerðir, sum skulu fremjast av skurðlæknum, ið eru útsendir av Landssjúkrahúsinum.

Stýr á sergreinunum

Umframt sjúklingatrygdina og dygdina í viðgerðini annars, hevur tað stóran týdning fyri evnini at lokka fleiri serlæknar til, at sjúkrahúsini koma undir eina leiðslu, og øll serlæknastørvini verða miðsavnað á Landssjúkrahúsinum, heldur Tummas í Garði, tí ongin serlæknagrein kann fungera optimalt í dag, við bert einum serlækna einsamallum úti á einum lítlum sjúkrahúsi.

– Tað hevur verið trupult at fáa teir læknarnar, vit hava mest brúk fyri, men tess størri og meira fjølbroytt tað læknaliga umhvørvið er, tess størri er hugurin hjá læknum at koma her. Vit eru eisini í tí hepnu støðu júst nú, at nógvir føroyingar – okkurt um 100 – eru í ferð við at útbúgva seg til lækna. Um vit bera okkum rætt at, fáa skil á uppgávubýtinum millum sjúkrahúsini og gera okkum greitt, hvørjar sergreinir, vit skulu hava, so fer tað eisini at skunda undir nýggju læknarnar at fáa sær tær serútbúgvingar, vit hava størst tørv á.

– Á tann hátt verður tilvildin minni, og tað fer at bera betur til hjá myndugleikunum at stýra sjúkrahúsunum og viðgerðartilboðunum heldur enn øvugt, sum nú, har tað eru yvirlæknar við tilvildarligum sergreinum, ið stýra, sigur Tummas í Garði.

Hvat hava sjúkrahúsini kostað landinum

Fara vit víðari so kemur TíG við tí gamla tvætlinum um, at tað verður sparing í at niðurleggja KS og SS. Tað er jú prógvað ferð eftir ferð, at henda sparin bert er á pappírinum. Tá avtornar liggur meiriútreiðslan eftir eitt niðurlagt sjúkrahús uppi á umleið 15%. Tað eru trygg tøl fyri tí.

Hinvegin hevur LS seinastu 15 árini fingið økt sína játtan svarandi til játtanina til KS og SS tilsamans. Harafturat eru nýbyggingar og renoveringar uppá slaka milliard gjørdar ella ávegis. Og hvat er komið burturúr? LS hevur seinastu árini fingið minni kanningar og viðgerðir tí sjúklingar av meginøkinum leita alt meira til KS nú tað gjørdist høgligt við einum undirsjóvartunnil.

Og møsnið frá Tummasi heldur Gudhjálpi mær áfram. Tí so leggur TíG høvur á skrá og fær kroyst burtur úr sær hvussu harmuligt tað er við øllum hesum kostnaðarmiklu tólunum á KS.

Eg kann vissa TÍG um, at hann kann sova tryggt. 90% av allari medisinskari útgerð stendur á LS. Restin er á KS og SS. So her hava vit tvey sera effektiv og bílig sjúkrahús sum skapa trygd, dyggd og tænastu til borgarnar í øllum landinum.

Yvilæknaførleikin lækkar støðugt

Argumentið um, at savna alla viðgerð á LS skal hjálpa uppá royndirnar hjá læknunum er heilt burturvið og fylgir omanfyrinevndu vandaleið við falskari trygd.

Seinastu árini eru eisini serlæknaútbúgvingarnar hjá føroyskum yvirlæknum versnaðar munandi. Tað er komin ein siðvenja (óvani), at læknar taka partar av sínu serlæknaútbúgving á LS.

Tað vil við øðrum orðum siga, at partar av serlæknaútbúgvingini fer fram á einum sjúkrahúsi sum hevðið verði niðurlagt um tað til dømis lá í Danmark. Síðani verður farið av og á til donsk sjúkrahús (sum eru tey vánaligastu í Norðanlondum) at taka restina í pørtum.

Hetta var ongantíð ætlanin við serútbúgving og er sjálvandi á sera lágum støði. Harafturat verður farið alt ov skjótt til Føroyar eftir, at serlæknagóðkenningin er komin.

Soleiðis fáa nógvir av okkara yvilæknunum heldur ikki tær neyðugur royndirnar sum skulu til fyri at kunna røkja serlæknatænastu í einum so avbyrgdum landi sum Føroyar.

Eisin uppdateringin av serlæknunum er í nógvum førum vánalig. Tað eru bert fáir sum hvørt ár fara longri tíðarskei av landinum til størri sjúkrahús í grannalondunum til uppdatering og at fáa sær royndir.

Narkosulæknar í Føroyum

TíG er harmur um, at tað eru narkosulæknar í Klaksvík og á Tvøroyri og, at betri var um teir vóru í Havn.

Vit høvdu fastan narkosulækna í Klaksvík og hann fór til Havnar. Og eg stuðlaði honum fullt og heilt í hesum. Orsøkin var sjálvandi, at royndir og uppdatering av einum einsamallum narkosulækna í Klaksvík varð vónleyst. Møguliga heldur frægari á LS.

Klaksvík fór so yvir til narkosulækna avloysarar. Tað vil siga narkosulæknar sum eru í starvi uttanlands og fáa sínar royndir og uppdateringar har teir arbeiða.

Hesir koma fullt uppdateraðir til KS. Og eg kann tryggja TíG um, at vit ikki seta narkosulækna avloysarar sum í áravís hava arbeitt í fyrisitingarligum starvi.

Sita serlæknar hendur í favn á Klaksvíkar Sjúkrahúsi?

Tummas herjar víðari við, at serlæknar í Klaksvík hava lítið at gerða. Hevur hann nakað ítøkiligt?

Í skrivandi stund havi eg hesa vikuna 10 liðútskiftingar av køum og mjadnum, 3 ryggskurðviðgerðir og 14 aðrar ortopediskar skurðviðgerðir við kikara og øðrum liða og bein skurðviðgerðum.

Nakað tað sama er tá hinir serlæknarnir eru. Vit vilja helst halda arbeiðið innan fyri normala arbeiðstíð, men tað er ofta trupult hjá urologunum sum javnan fara útum vanliga arbeiðstíð. Her verður í hvussu er ikki sitið á hondunum!

Læknalig grungeving í sjúkrahúsverkinum

Sum nakað nýtt tekur TíG upp møguliga læknaliga grundgeving fyri at hava 3 fullt útbúgvin sjúkrahús í Føroyum.

Fyri tað fyrsta skal sigast, at vit hava ikki 3 fullt tilbúgvin sjúkrahús í Føroyum. Sum sagt hava vit 3 smá sjúkrahús í Føroyum har tað eina er betri fyri tá tað kemur til størri bráðneyðuga viðgerð. Hini bæði hava eina beinagrinds tilbúgving.

Tá tað kemur til læknaliga grundgeving fyri sjúkrahúsum í Føroyum so finst ongin læknalig grundgeving fyri, at hava sjúkrahús í Føroyum í heila tikið. Um gjørt verður undantak fyri hesum, so er hampulig læknalig grundgeving fyri, at hava 3 vælútbúnar skaðastovur við seingjarmøguleika, vælútbúna kanningarpark við framkomnum kanningartólum og møguleika fyri akuttum lívbjargandi átøkum sum ikki tola langvegis flytingar. Restin eigur so vítt gjørligt at fara fram uttanlands.

Politiskt/búskaparligu viðurskiftini hava sett okkum karmar at arbeiða innanfyri. Okkara uppgáva er gerða okkara gerning innan hesar karmar ístaðin fyri í tíð og ótíð brúka nógva orku til at umrøða karmarnar og leggja á hvønn annan. Heldur taka sær av sjúklinginum.

Hvør skal liva og hvør skal doyggja

At enda í greinini leggur TíG trumfin á borðið. Hini sjúkrahúsini eru orsøk til at fólk doyggja óneyðugt. Um bert hann hevðið fingið hesar sjúklingar fyrr undir hond so høvdu tey ikki doyð.

Okkara royndir benda meira á, at súklingar doyggja júst tí teir koma á LS. Skuldu als ikki verið sendir til LS. Høvdu gloymt, at hetta er eitt lítið sjúkrahús við sera avmarkaðum møguleikum. Vit hava annars ein lista!

Tað kann verða at TíG heldur seg verða Gud og avgerð hvør skal liva og hvør skal doyggja. Men í tí veruliga lívinum er hetta ikki galdandi.

Í summun førum hava vit sent sjúklingar beinleiðis av landinum og har eru fleiri sólskynssøgur sum sjúklingar kunnu siga frá.

Leys kanón á Landssjúkrahúsinum

Haldi tað verða sera óheppið at hava hasa leysu kanónina gangandi á LS. Vit byggja stillt og róligt upp eitt sera gott samarbeiði við yvirlæknar og starvsfólk annars á LS til TíG metir, at tíðin er komin til at leggja hetta samstarvið í sor. Og so byrjar hann at skjóta við síni leysu kanón sum er neyvt instilla í ein landnyrðing.

Í staðin fyri at tosa um LS tá hann verður boðin í fjølmiðlarnar, so fer meginparturin av tíðini til at hella skræpu niður yvir Klaksvíkar Sjúkrahús. Er tað ongin sum kann taka í nakkaspikið á hesum manni so vit kunnu byggja eitt gott samstarv innan sjúkrahúsverkið?